gult cyan magenta svart



# Fleiri neistafólk til Íslands

*Komandi mánadag fer Inga F. Danberg til royndarvenjingar hjá ÍBV, har fyrrerandi liðfelagin, Gunnleyg Berg eisini er í leikarahópinum*

Jákup Mørk

Í farnu viku skrivaðu vit, at komandi kappingarárið verður Gunnleyg Berg ikki at síggja á besta kvinnuliðnum hjá Neistanum.

Eftir at hon saman við Anniku Ljósstein úr Stjørnuni hevði royndarvant við ÍBV av Vestmannaoyggjunum, gjørdi hon í farnu viku sáttmála við felagið.

**Bakspælara**

Í tí sambandi varð nevnt, at felagið framvegis leitaði eftir einum vinstra bakki, tí hugurin hjá Anniku ikki var nóg stórur. Enn eina ferð hevur felagið vent eyguni móti Føroyum, og nú er tað Inga F. Danberg, sum hevur fingið tilboð um at koma til Íslands at royna seg.

Inga váttar fyri Sosialinum, at hon komandi mánadag fer til Íslands, men í fyrsta umfari vil hon ikki leggja ov stórt trýst á seg sjálva í so máta.

- Eg taki hetta fyrst og fremst sum eina stóra upplivingi, so eg verið ikki vónbrotin, um eingin sáttmáli spyrst burturúr. Hinvegin eri eg eisini til reiðar at taka av, um tað skuldi gingist nóg væl undir venjingunum, tí skal eg sleppa at royna hetta, so má tað vera nú, heldur Inga.

Í fyrsta umfari verður talan um, at Inga skal venja við íslendska liðnum í eina viku. Gongst hetta nóg væl, verður talan helst um eitt tilboð, sum spælarin so kann taka av ella vraka.

Kemur tað somikið langt, verður talan væntandi um eitt tilboð, álíkt tí hjá fyrrverandi (og kanska komandi) liðfelaganum, Gunnleyg. Tað vil við øðrum orðum siga, at umframt at spæla hondbólt, skulu spælararnir eisini arbeiða hálva tíð.



*Mánadagin komandi fer Inga D. Danberg til Íslands, har hon í eina viku skal royndarvenja við ÍBV*

# Viðmerking

Kappingarnevndin sigur í sínum úrskurði , at grein 33, stk. 2, 1 petti skal skiljast soleiðis, at bert stigini telja, og at hetta annars er samsvarðandi orðingini í greinini.

Hetta er SKEIVT, vegna tess, at innanhýsisdystir pr. Definitión innihalda 3 elementir:

1. Stigini
2. Málmunin
3. Útivallarmál

Um lógin ikki inniheldur øll hesi elementini, skal tað viðmerkjast greitt í lógartekstinum, hvørji elementir ið eru galdandi. Alt annað er vánaligt lógarsmíð og púra meiningsleyst.

Grein 1 stk. 1 í kappingarreglunum fyri fótbólt sigur, at fyri kappingina eru lógir FSF's galdandi og annars ALHEIMS reglur fyri fótbólt (um tær føroysku onkursvegna ikki eru nøktandi).

Undurritaði hevur havt samband við skrivstovuna hjá UEFA í Sveits ( divisions department) har eg tosaði við Antonio Jacchino um, hvørjar alheims reglur í eru galdandi viðv. innanhýsis dystum, og fekk eg at vita, at reglurnar eru púra greiðar.

Um tað stendur á jøvnum eftir kappingarlok, og innanhýsis dystir eru nevndir í lógini telja:

Fyrst stigini
Síðan málmunurin innanhýsis
Og síðani útivallarmál

Tað er tí óskiljandi at ein juristur, íð kappingarnevndin hevur havt sum ráðgeva, kann koma til nakra aðra niðurstøðu enn at útivallarmál telja dupult, og at allar aðrar niðurstøður tessvegna eru skeivar og púra meiningsleysar.

Um grein 1 stk. 1 og grein 33 stk. 2 2.petti verða samanbornar við UEFA reglurnar um innanhýsis dystir, telja útivallarmál dupult.

Fyri okkum her suðuri er alt hetta rumbli tó ikki so løgið hóast alt, nú tá Jógvan Páll Lassen er farin upp í málið. Tí loyaliteturin millum juristarnar í Havn er helst størri, enn týdningurin av um VB ella B68 verða snýtt fyri eitt FM heiti.

Vónandi verður hendan reglan tó ikki avgerðandi fyri hvar FM heiti endar, men um so skuldi borið á, eri eg bangin fyri, at FSF ikki himprast yvir at slakta eitt útjaðaralið sum VB ella B68 til frama fyri HB

Erhard Joensen

# John Arni vísir veg

*Talv: Amagermeistaraheitid vard lidugt telvad sunnudagin, og vinnari bleiv John Arni Nilssen vid nærum fullum stigatali.*



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Tveir føroyingar luttóku í Amagermeistaraheitinum í ár, John Arni og Heini Olsen.

Eftir fyrstu seks umførini varð longu eyðsæð at John Arni helst fór at enda ovastur í kappingini. Hann hevði nevnliga vunnið øll hesi fyrstu seks talvini, og var tá heili tvey stig frammanfyri teir næstu. Millum teir næstu í røðini varð Heini Olsen at síggja.

Í sjeynda umfari møttust føroyingarnir yvir talvborðið, og hetta bleiv- ikki óvæntað- ein stuttur javnleikur. Í áttanda umfari tók John Arni sær av løttum við einum javnleiki móti einum dana við umleið 2100 í rating. Ein javnleikur hevði verið nóg mikið hjá honum í seinasta umfari, men John Arni, við nógvum sjálvsálitið í løtuni, vildi meir og vann trygt.

John Arni vann tí kappingina við átta stigum av níggju møguligum, og sjálvt um hann var favorittur, so er átta av níggju sjálvsagt flott. Heini endaði eitt sindur skuffandi á einum triðja plássi við seks stigum. Talvið hesa vikuna er frá sætta umfari.

Næsta kappingin hjá John Arna verður GM kappingin í Føroyum.

**Talvfelagið Føroyar — ambitiónir og framtíð**

Talvfelagið í Keypmannahavn hevur seinastu árini kempað fyri at hildið sær uppi í triðfremstu deildini í donsku liðkappingini, men í ár er liðið sera sterkt og málið er tískil at flyta upp. Ikki er hetta mál veruleikafjart, tí í ár telvað bæði John Arni og Heini Olsen við felagnum, og á triðja borðið fer tilflytarin og føroyameistarin Flóvin Tór Næs at slúka stig.

Átta mans mynda liðið, og hinir fimm eru heldur ikki ókendir menn, og teir eru Eyðun Nolsøe, Bogi Ziska, Rógvi W. Rasmussen, Heini Danielsen og Terji Petersen. Eykamenn eru undirritaði og Jóan H. Andreassen, sum býr í Árhus men hevur játtað at telva við um brúk verður fyri honum.

Sum nakað heilt nýtt og óroynt í føroyskum høpi, so hevur liðið eina bonusskipan. Tað vil siga um tú vinnur eitt talv so fært tú eina ávísa peningaupphædd, og leikur tú javnt fært helvtarupphæddina. Tapir tú fært tú sjálvsagt eingi oyru.

Hendan bonusskipan vísir seg at vera neyðug, tí til dømis telvaðu John Arna og Heini í fjør við feløgum, sum høvdu bonusskipanir. Pengar er komnit í talv, og Talvfelagið Føroyar noyðist at fylgja við. Bonusskipanin vil uttan iva skumpa undir føroysku telvarnar at gera sítt besta.

Tað stóra endamálið hjá felagnum er at leika í fyrstu deild ár 2003, og hetta endamál er als ikki ógjørligt.

**Nordic Millennium GM Chess**

Hendan kapping við tí flotta heitinum verður í Norðurlandahúsinum í døgunum 6-14. oktober í Norðurlandahúsinum.

Tað er Talvsamband Føroyar og altjóða dómarin og danin Mogens Nielsen sum samskipa kappingina. Talvsambandið bleiv 30 ár í ár, og í hesum sambandi verður hendan sterka altjóða kapping veruleiki.

Kappingin er sterk, og teir umleið 10-15 føroysku telvarnir sum vera við fara at fáa tað strævið, men hinvegin verður ein hampiligur møguleiki at ognað sær ein IM norm. Teir flestu topptelvarnir í Føroyum eru við, og komandi dagarnar verður greitt hvørjir eru við- og ikki við.

Av kendum telvarum sum verða við kunnu nevnast stórmeistarnar russarin Ruslan Ponomariov , írin Alexander Baburin, fremsti íslendarin Hannes Stefansson og ísraelitturin Lev Psakhis. Millum aðrar kendu luttakandi stórmeistarar er sviin Tiger Hillarp Persson, sum telvaði tvey ár við kollfirðingum.

Í næstu talvgrein verður hugt nærri at kappingini og luttakarunum.

**Talvið hesa vikuna**

Hvítur: Peter Lassen (2257)
Svartur: John Arni Nielsen (2316, donsk rating)

**AM 6. umfar**

1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 e5 5.Nb5 d6 6.c4 26.Nd2 Qh6 27.Ne4 Raf8 28.Rxd6 Rxf3 29.Rxe6 Qe3 30.Nd6 Rf2 31.Qh3 Qf3+ 32.Kg1 Nf4 0-1 Be7 7.b3 Nf6 8.Bd3 Bg4 9.f3 Be6 10.0-0 Nh5 11.g3 g6 12.Qd2 0-0 13.Rd1 a6 14.N5c3 Nd4 15.Qe3 Bg5 16.Qf2 Bxc1 17.Rxc1 Qg5 18.Rd1 f5 19.Kh1 fxe4 20.Bxe4 Rf7 21.Qd2 Qe7 22.Nd5 Qf8 23.Qg2 Nxf3 24.Nc7 Rxc7 25.Bxf3 Rf7



*Verandi føroyamestarin, Flóvin Tór Næs, telvar hetta árið á triðja borði hjá Talvfelagnum Føroyar*

gult cyan magenta svart



# Móttøka í Sørvági



*Beint áftaná móttøkuna leg›i Vesturvón frá landi til n‡ggjan túr. Myndin er tikin eina a›rufer› tá Vesturvón kom heim*



*Nógv fólk eru altí› á bryggjuni í Sørvági, tá Vesturvón kemur og fer*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

At receptiónir ver›a hildnar uttanfyri Havnina er sjáldsamt, men ta› hendir og mánadagin vóru fólk á fótum í Sørvági, tí tá fekk stoltleiki bygdarinnan, flakatrolarin "Vesturvón" HACCP certifisering, sum fyrsta skip í heiminum. Hetta er ein ví›kan av innaneftirlitinum í framlei›sluni umbor› sum merkir, at hvørt einasta ting sum ver›ur gjørt vi› fiskin, frá tí hann kemur á dekki› og til hann liggur í frystidiskunum úti í heimi, er skrásett. Hvør einasti pakki av flaki er undir neyvum eftirliti og skuldi okkurt veri› gali›, ber beinanvegin til at finna feilin. Um eitt skip l‡kur HACCP certifiseringstreytirnar, so merkir ta› at vøran hetta skip tilvirkar hevur hægstu gó›sku.

Nógv fólk var samankomi›, tí rei›aríi› vildi hátí›arhalda henda dag, tá Andrass Gregersen, umbo› fyri Norsk Veritas, handa›i rei›ara og skipara vertifiseringsskjølini, sum sjálvsagt vóru innramma›i.

Móttøkan var klokkan f‡ra mánadagin. Longu klokkan tr‡ seinnapartin hev›i manningin mynstra›. Tey flestu fólkini vóru farin í land aftur klokkan fimm og klokkan seks mánakvøldi› stevndi Vesturvón av Sørvági til n‡ggjan tú í Barentshavinum



*Frá vinstru: Hanus Olsen, sum hevur veri› skrivstovuma›ur hjá P/F Vesturvón øll árini og sum m.a. hevur syrgt fyri teim gó›u avrokningunum, sum hetta skip so mangan hevur givi›. Hugo Fjøroy, kendur fer›avinnuma›ur í Føroyum og gamli rei›arin á Vesturvón, Eivind Niclasen*

Myndir: Ólavur í Beiti



*Niclas Niclassen, nevndarlimur og eigari í Vesturvón, er eisini pápi okkara fiskimálará›harra, Jørgin Niclasen*



*Ólavur Petersen, rei›ari, tosar her vi› Jørgin Niclasen, sørving og fiskimálará›harra*



*Rei›arafrúan Katrin Petersen í galluni.*



*Tórfinn Johannesen, skipari á Vesturvón hendan túrin, vi› HACCP skjalinum.*



*Børnini vóru eisini umbor›; her Anna Joensen og Katrina Heinesen í Beiti*



*Frá móttøkuni. Skiparin Tórfinn Johannesen og daman longst til vinstru, Ólavur Petersen, rei›ari, fremst og Andrass Gregersen, Norsk Veritas longst til høgru.*



*Aftaná móttøkuna mánadagin fór Vesturvón n‡ggjan túr. Her eru partar av manningini í salongini.*